# Kendur klaksvíkingur verður havnastjóri

Havnanevndin hjá Klaksvíkar býráð hevur sett Niclas Hera Jákupsson sum havnastjóra fyri Klaksvíkar Havn

Ein av fyrstu avbjóðingunum hjá havnastjóranum verður at gagnnýta nýggju karmarnar, sum Klaksvíkar havn hevur fingið tey seinnu árini, og at skipa soleiðis fyri, at havnin kann menna og nútímansgera seg á øllum mótum, skrivar kommunan í tíðindaskrivi.

Niclas Heri Jákupsson er 40 ára gamal, hevur HF og HH-útbúgving, útlærdur skrivstovumaður og hevur ymisk skeið í samband við leiðslu, sølu og menning. Niclas Heri Jákupsson hevur royndir sum sølumaður í heilsølu, leiðari hjá Shell í Norðoyggjum, og ta síðstu tíðina hevur hann verið sølu- og marknaðarleiðari hjá Shell.

Til stuttleikar kann nevnast, at nýggi havnastjórin er kendur frá leiklutinum sum Trøllapætur og má metast sum høvuðsmaðurin aftanfyri bólkin, Dynamitt, sum skulu spæla á Summarfestivalinum.

Niclas Heri Jákupsson byrjar í starvinum sum havnastjóri hjá Klaksvíkar Havn tann 1. november.

-km



*Frá vinstru: Atli Justinussen, formaður í Havnanevndini, Niclas Heri Jákupsson, komandi stjóri í Klaksvíkar Havn, og Kristian Fríðrik Olsen, varaborgmeistari í Klaksvík*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin og hósdagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot tiil andøvsgul av landnyrðingi, eitt skifti upp í stívt andøvsgul. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 12 og 16 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 16 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 31 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 27 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1002 hPa. við Vesturnoreg stendur í stað og grynnist. Eitt hátrýst, 1027 hPa. yvir landsynningpartin av Grønlandi stendur eisini í stað.



**Í dag:**
Lágtrýstið við Vesturnoreg fer spakuliga norðureftir. Hátrýstið yvir Grønlandið fer spakuliga eystureftir og viknar

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/08 kl. 06⁰⁰ – 04/08 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/08 kl. 06⁰⁰ – 04/08 06⁰⁰.
Avfallið higartil í august: 2 mm




Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 30. august | Mánin næstur jørðini |
| 1. august | Tendring |
| 8. august | Fyrra kvarter |
| 10. august | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. aug. | 10:25 | 22:47 | 9:25 | 21:47 | 9:40 | 22:02 | 0:05 | 12:25 | 1:05 | 13:25 | 8:40 | 21:02 | 7:40 | 20:02 | 10:40 | 23:02 | 11:40 | - | 10:10 | 22:32 | 11:25 | 23:47 |
| 6. aug. | 10:47 | 23:28 | 9:47 | 22:28 | 10:02 | 22:43 | 0:47 | 12:47 | 1:47 | 13:47 | 9:02 | 21:43 | 8:02 | 20:43 | 11:02 | 23:43 | 0:02 | 12:02 | 10:32 | 23:13 | 11:47 | - |
| 7. aug. | 11:49 | - | 10:49 | 23:10 | 11:04 | 23:25 | 1:28 | 13:49 | 2:28 | 14:49 | 10:04 | 22:25 | 9:04 | 21:25 | - | 12:04 | 0:43 | 13:04 | 11:34 | 23:55 | 0:28 | 12:49 |
| 8. aug. | 0:10 | 12:46 | 11:46 | - | - | 12:01 | 2:10 | 14:46 | 3:10 | 15:46 | 11:01 | 23:37 | 10:01 | 22:37 | 0:25 | 13:01 | 1:25 | 14:01 | - | 12:31 | 1:10 | 13:46 |
| 9. aug. | 1:22 | 13:59 | 0:22 | 12:59 | 0:37 | 13:14 | 3:22 | 15:59 | 4:22 | 16:59 | - | 12:14 | 11:14 | 23:51 | 1:37 | 14:14 | 2:37 | 15:14 | 1:07 | 13:44 | 2:22 | 14:59 |